# Kunngerð

## um broytingar
## í byggisamtyktini og bygdarskipanini
## fyri Vestmanna Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum boðað frá, at Vestmanna Bygdarráð hevur samtykt at gera hesar broytingar í byggisamtyktini og bygdarskipanini fyri Vestmanna Kommunu.

Broyting í byggisamtyktini (tekstinum):

1. strika orðingina Byggisamtykt 2008 – 2020

Broytingar í bygdarskipanini (kortinum)

1. umskipan av almennum øki E á Fornlendi soleiðis, at
   - at almenna økið fylgir matriklinum nr. 16l, Missións-húsið
   - at parkeringsøkið norðanfyri Missiónshúsið, partur av matr. nr. 16a, verður lagt sum vegur
   - at almenna økið, sum liggur uttanfyri matrikkul nr. 16l (Missiónshúsið), fær ásetingina F: alment frítíðarøki. Lendið er partur av matr. nr. 16a.
2. umskipan av almennum øki E á Grønanesi, har Heimið á Grønanesi er, soleiðis,
   - at almenna økið fylgir matriklinum nr. 36ag, Heimið á Grønanesi
   - at vegurin litra "b" vestanfyri matr. nr. 36ag verður lagdur sum vegur í bygdarskipanini
   - at økið ímillum matr. nr. 36ag og sjóvarmálan verður lagt sum øki D: Havnarøki. Økið er partur av matr. nr. 36c.
   - at almenna økið vestanfyri litra "b" verður lagt sum øki H: Frílendi. Økið er partur av matr. nr. 36c.
3. umskipan av almennum øki E og víðkan av vinnuøki C Inni á Fjørð
   - at almenna økið fylgir matriklinum nr. 216y. Miðnám í Vestmanna
   - at matr. nr. 216v, Fjørukrógvin, verður lagt sum vinnu-øki C
   - at parkeringsøkið ímillum matr. nr. 216y og 216v verður lagt sum vegur í bygdarskipanini. Økið er partur av matr. nr. 216n.
   - at økið ímillum matr. nr. 216y og sjóvarmálan verður lagt sum øki D. Havnarøki. Økið er partur av matr. nr. 216n.
   - at vegøkið vestanfyri matr. nr. 216y verður víðkað ímóti matr. nr. 216y. Økið er partur av matr. nr. 216n.
4. parkeringsøki við Toftaveg, partur av litra "a"
   - partur av sethúsaøkinum á matr. nr. 183a verður broytt til veg. Økið er gjørt til parkeringspláss.
5. Víðkan av vegøki litra "a" á Hallarvegi.
   - partur av litra "a" gongur sum atkoma oman ímillum matr. nr. 223, 205bo og 205ag. Hesin partur verður at broyta frá sethúsaøki til veg.
6. Víðkan av vegøki litra "b" á Bakkavegi
   - partur av litra "b" gongur sum atkoma niðan ímillum matr. nr. 11a, 30a, 68c og 68h. Hesin partur verður at broyta frá sethúsaøki til veg
7. Víðkan av vegøki litra "cd" á Fjalsvegi
   - vegøkið verður víðkað við parkeringsplássi frammanfyri matr. nr. 298b. Økið verður broytt frá sethúsaøki til vegøki. Parkeringsplássið er gjørt.
8. Víðkan av vegøki litra "a" Ovari Vegur
   - partur av matr. nr. 205bv og 205bx verður broyttur frá frílendi til veg soleiðis, at vegøki fylgir vegnum
   - partur av litra "a" - omanfyri matr. nr. 212b – verður broyttur frá sethúsaøki til veg soleiðis, at vegøkið fylgir markinum ímóti matr. nr. 212b
9. Víðkan av sethúsaøki matr. nr. 205ca
   - Vestmanna Kommuna hevur samtykt at selja eigarunum av matr. nr. 205ca lendi burtur av litra "cd", Fjalsvegi. Lendið verður selt soleiðis, at tey ognast lendið ímillum grundstykki teirra matr. nr. 205ca og Fjalsveg litra "cd".
     Sethúsaøkið verður víðkað við lendinum ímillum grundstykkið matr. nr. 205ca og Fjalsveg, litra "cd", soleiðis, sum vegurin er liðugt gjørdur.
10. Víðkan av neystalendi á Fitjum
    - neystaøkið G á Fitjum verður víðkað frammanfyri matr. nr. 266g og 266e og eystanfyri matr. nr. 266e. Økið er partur av matr. nr. 354a og ómatrikuleraðum sjóøki. Byrjað er at gera grótfyllu á ómatrikuleraða sjóøkinum.
11. Parkeringspláss á Bakkanum
    - víðka part av litra "b" frá frílendi til veg - ætlað til parkeringspláss

12. Samanbygging av skúlabygningunum
   - í samband við ætlaða samanbygging av skúlabygning-unum tvørtur um Gjógvará, litra “D”, verður neyðugt at víðka almenna økið E tvørtur um Gjógvará. Samstundis verður frílendið, øki H, minkað samsvarandi. Viðmerkjast skal, at Náttúrufriðingarnevndin fyri Streym-oyar Sýslu í skrivi, dagf. 24. apríl 2024 ”er samd um at viðmæla ætlanini, og tekur undir viô at lata eitt “proforma-viðmæli” til ætlaðu byggingina, og verður málið latið Yvirfriðingarnevndini til endaliga støðu- takan”.
     Yvirfriðingarnevndin hevur í skrivi frá 2. juni 2024 boðað frá, at ”Sagen blev behandlet på møde i Overfredningsnævnet, hvor det blev besluttet at stadfæste lokalnævnets afgørelse”.
13. Víðkan av vegøki við Gerðisveg, partur av litra "a"
   - broyta part av matr. nr. 94e frá sethúsaøki til veg - ætlað til parkeringspláss

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á kommunu-skrivstovuni

**í vanligari skrivstovutíð**
**frá 27. juni til 18. juli 2025**
**- báðir dagar íroknaðir.**

Broytingarnar síggjast eisini á heimasíðuni hjá kommununi: www.vestmanna.fo

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 15. august 2025.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 8**
**350 Vestmanna**